# Tað sær svart út...



# ...men pengar eru í tí

Eftir at samstarvsavtalan millum P/F Atlantic Petroleum og The Faroes Partnership er gjørd og marknatrætan við Bretland er loyst, er rættilig ferð komin á virksemið í felagnum. Fyri at styrkja felagið fíggjarliga, hevur nevndin avgjørt at hækka partapeningin og geva føroyingum høvi at gerast ein partur av komandi oljuvinnuni í Føroyum.

Aðalfundurin í P/F Atlantic Petroleum hevur heimilað nevnd felagsins innan 31. desember 1999 at hækka partapeningin við 26.660.000 kr. Á nevndarfundi í felagnum tann 15. og 23. september var gjørt av, at tekna partabrøv fyri í minsta lagi 15.000.000 kr. og í mesta lagi fyri 26.660.000 kr. Partabrøvini, sum hava eitt áljóðandi virði á 500 kr. verða seld fyri kurs 105, sum svarar til 525 kr. fyri hvørt partabrævið.

Føroya Sparikassi og P/F Føroya Banki standa fyri hækkingini av partapeninginum. Norðoya Sparikassi og Suðuroyar Sparikassi luttaka sum tekningarstøð.

Tekningin verður skipað soleiðis, at áhugað kunnu lata einum av tekningarstøðunum bindandi tilboð um keyp av partabrøvum fyri ásetta kursin.

**Tíðarskeið**
Tekningartíðarskeiðið er frá og við hósdegnum 14. oktober 1999 til og við mikudegnum 27. oktober 1999. Útgávupeningastovnarnir kunnu tó í samráð við P/F Atlantic Petroleum avgera at stytta tíðar-skeiðið.

**Tey sum ynskja at keypa partabrøv, kunnu venda sær til:**

**P/F Føroya Banki**
Fíggjardeildin
Húsagøta 3
FO 100 Tórshavn
**ella deildir bankans**

**Norðoya Sparikassi**
700 Klaksvík

**Føroya Sparikassi**
Fíggjardeildin
Tinghúsvegur 14
FO 100 Tórshavn
**ella deildir sparikassans**

**Suðuroyar Sparikassi**
900 Vágur



Atlantic Petroleum
P.O.Box 1228, Bryggjubakki 4
FO 110 Tórshavn
www.petroleum.fo